Bøkur

# Oyggjablaðið í næstu viku: Eiði

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Bøkur

**Í hesum blaðnum viðger Oyggjablaðið evnið um bøkur og útgávu av bókmentum.**

**Lesið um:**

**Síða 18:** Glæstribøkur fyri 2,50

**Síða 20-22:** Smáir lepar gjørdust stóra bygdarsøga

**Síða 24-25:** Tær eldru bøkurnar eru best

**Síða 26:** Matgerð í nýggjum hami

**Síða 28-29:** Fleiri rithøvundar á sama arbeiðsplássi

**Síða 30:** Soleiðis skrivar tú bøkur

**Síða 42-43:** Skakandi at skriva bøkur

**Baksíðan:** Erhard og Glæstribøkurnar

# Tá tann besta bókin kostaði 2,50

**BARNABØKUR** Tað var eins stórur dagur fyri júst 52 árum síðani, tá tær fyrstu Glæstribøkurnar komu út. Børnini tóku bøkurnar til sín, og ikki gekk long tíð til tær vóru útseldar - allar 9.000.




Snorri Brend

Á sumri í 1957 vóru stórar útgávuætlanir í umbúna hjá tí, sum vit í dag kenna sum Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Á fundi í bókanevndini 20. juni hetta árið varð komandi útgávan av teimum seinni so tiltiknu Glæstribókunum umrødd.

Nevndini stóð í boði at geva út 12 myndabøkur, sum hvør eru ein stutt, fittlig smásøga, sum er prýdd við litmyndum.

Á fundinum varð greitt frá, at allar týðingarnar vóru fingnar frá hondini, og at ætlanin var at lata bøkurnar til prentingar sum skjótast. Nevndin samtykti at kanna týðingarnar gjølla, áðrenn prentað verður, og til hetta starv vórðu valdir J. M. Kjeld og Marius Johannesen.

Helst var tað J. M. Kjeld, sum fekk hesa útgávu í lag, og sermerkt er tað, at hendan útgávan kann kallast fyrsta føroyska barnabókin í samprenti.

Á fundi í oktober 1958 upplýsti nevndarformaðurin, J. M. Kjeld, at hann hevði arbeitt við útgávuni av Glæstribókunum, meðan hann hevði verið í Keypmannahavn. Prentingin var um av vera avgreidd, og bøkurnar fóru at koma til Føroyar í november.

### Útseldar

Tær so væl umtóktu glæstribøkurnar vóru 12 í tali. Allar 24 síður við myndum í litum. Talan var um samprent í samstarvi við danska Illustrationsforlaget. Prísurin var 2,50 kr. fyri hvørja.

Útgávan av Glæstribókunum var ein stór íløga, sum varð fíggjað við láni, sum Lærarafelagið tók í Føroya Sparikassa.

Lánið uppá 38.000 krónur varð skipað soleiðis: "at vit ongan avdrátt gjalda í trý ár, og renturnar tey trý fyrstu árini verða goldnar úr landskassanum", sum skrivað stendur í gerðabók Lærarafelagsins. Bókadeildin yvirtók tað, ið eftir var av láninum, í 1962.

Nógv varð gjørt burtur úr at fáa Glæstribøkurnar seldar. Bókanevndin vendi sær til lærarar kring landið og fekk teir at standa fyri søluni. Og væl hepnaðist, tí nógv settu seg fyri bøkurnar, sum tá í tíðini vóru bæði snotuligar og hartil forkunnugur lesnaður.

Á nevndarfundi um várið árið eftir varð upplýst, at umleið 9.000 eintøk eru seld og at royndt verður at fáa skúlarnar at keypa flokssett.

Glæstribøkurnar komu út til jóla 1958, og tí varð avgjørt ikki at geva Mína Jólabók út hetta árið, men í staðin lata Glæstribøkurnar vera jólabøkur felagsins 1958.

*(Kelda: Brot úr bókini "Og so veit eg eina vakra søgu". Bókadeild Føroya Lærarafelags 1956-2006.)*

## 12 bøkur

**Glæstribøkurnar vóru 12 í tali:**

- Dunnu Billa horvin
- Hundahvølpurin sum fekk sólina at rísa
- Heidi
- Leingi livi lítla tokið
- Tummil lítli
- Komið og spælið lækni
- Tríggir smáir kettlingar
- Óli Oyralangi og várið
- Gelli-Smelli skúlabussurin
- Petur Kanin
- Hvørji búgva í bóndans garði
- Sunnudagsdukkan

**Týðarar av bókunum vóru:**

Poul E. Petersen, Marius Johannesen, Jens Pauli Heinesen, Martin Joensen, Flóvin Flekk, Johan Kallsoy, Jákup M. Kjeld, Tummas Lenvig, Ludvig Petersen, Jákup Follend, Hans David Matras.

## Ikki út aftur

Hóast mong helst høvdu ynskt, at tær 12 Glæstribøkurnar komu út aftur, so hevur Bókadeildin ongar ætlanir um tað í løtuni.

– Um vit fáa høvi til tess, so gera vit tað, lovar Niels Jákup Thomsen, stjóri.

Føroyaprent plantar trø